# Útboð av verkætlan til at gera talgilt undirvísingartilfar um føðslu og burðardygd til 4.-6. floks næmingar

*Samandráttur*

- Nám ynskir tilboð upp á eina verkætlan, sum hevur til endamáls at gera talgilt undirvísingartilfar um føðslu og um burðardyggan og ábyrgdarfullan matídnað. Tilfarið skal eisini fevna um leiklutin hjá alivinnuni og fiskivinnuni í Føroyum
- Málbólkurin er næmingar í 4.-6. flokki, og í vavi skal undirvísingartilfarið fevna í minsta lagi um 10 undirvísingartímar
- Tilfarið skal mennast í samstarvi við Nám.
- Undirvísingartilfarið skal stuðla undir hugleiðandi, hugfangandi og djúphugsandi læring, sum tekur støði í viðkomandi námsætlanum og teimum 17 heimsmálunum fyri burðardyggari menning

*Verkætlanargrundarlag*

Nám hevur fingið stuðul til eina verkætlan, sum skal fremja talgilt undirvísingartilfar. Verkætlanin hevur ein fíggjarkarm upp til 300.000 kr.

*Endamál*

Málsetningurin er at menna kveikjandi undirvísingartilfar, ið ríkar undirvísingina í heilsugóðum og burðardyggum føðsluskipanum í yngru flokkunum. Tilfarið skal skapa læring, ið bæði fevnir um týdningin hjá havvinnuni í føroyskum høpi og um heilsugóða føðslu.

*Málbólkur*

Málbólkurin fyri undirvísingartilfarið eru næmingar í 4. til 6. flokki.

*Innihald*

Kenslufrøðiligu undirvísingargongdirnar, eisini nevnt didaktiseraðu undirvísingargongdirnar, í talgilda tilfarinum skulu millum annað taka støði í heimsmáli 14 hjá ST. Hetta heimsmál hevur heitið "Lívið í havinum". Tað er nærri útgreinað í undirmáli 14.2, sum sigur soleiðis:

*"Fyri 2020 skulu vistskipanir í høvum og fram við strendur verða vardar og umsitast á burðardyggan hátt fyri at sleppa undan skaðiligari ávirkan, millum annað við at styrkja teirra mótstøðuføri og við at fáa tær endurskaptar til tess at fáa sunn og fruktagóð høv."*

Undirvísingartilfarið skal eisini taka støði í heimsmáli 2, sum sigur, at vit skulu: "*gera enda á hungri, tryggja, at matur er tøkur, bøta um føðsludygd og virka fyri burðardyggum landbúnaði.*"

Undirvísingin skal miða ímóti, at børnini læra at skyna á, hvussu ábyrgdarfullur sjóvarskurður, t.d.

laksaaling, kann vera við til at tryggja føði og matartrygd.

Evnini og førleikarnir í nýggja tilfarinum, sum skal framleiðast, eru partur av námsætlanunum í lærugreinunum “náttúru og tøkni” og “heimkunnleiki”. Hesi fevna millum annað um kunnleika til matvøruframleiðslu, fatan av týdninginum av reinføri í sambandi við mat og matframleiðslu, kunnleika til føroyska matmentan, kunnleika til tað, at vera ein umhvørvistilvitaður brúkari í einum altjóðagjørdum heimi, fatan av náttúruvernd, dálking og grundleggjandi vistfrøði.

Námsætlanirnar leggja dent á, at næmingarnir læra at fara væl um og vísa fyrilit fyri náttúruni. Aftur at tí skulu næmingarnir læra at geva dømi um, hvussu dálking ávirkar drekkivatnið og at seta fram uppskot um, hvussu náttúrutrupulleikar bæði í egnum landi og í øllum heiminum kunnu loysast.

Hesar somu námsætlanir siga eisini, at næmingarnir skulu duga at greiða frá vakstrarhúsárini (t.d. við laksaaling), og at meta um, hvussu $CO_2$-útlát kann ávirka umhvørvi okkara, og seta fram loysnir, ið kunnu elva til, at útlátið minkar. At enda skulu næmingarnir læra at greiða frá grundleggjandi vistfrøði, frá føðiketu og føðineti og frá  heilsugóðum lívsstíli.

Kravið hjá Námi til nýggja undirvísingartilfarið er, at tað speglar nógv av teimum førleikakrøvum, sum standa í námsætlanunum, og at tað verður námsfrøðiliga og kenslufrøðiliga ella didaktist viðgjørt á ein hátt, sum skapar eina djúphugsandi læring.

(https://namsaetlanir.fo/folkaskuli/kravdar-laerugreinar/nattura-og-toekni-4-6/ og https://namsaetlanir.fo/folkaskuli/kravdar-laerugreinar/heimkunnleiki-6-10/)

*Krøv til verkætlanartilboðið*

Verkætlanartilboðið skal lúka hesi krøv:

- Verkætlanarlýsing skal setast upp við nágreining av, hvussu talgilt undirvísingartilfar skal gerast.
- Undirvísingartilfarið skal viðgera føðslu og burðardyggan, ábyrgdarfullan matídnað. Í hesum viðfangi eisini leiklutin hjá alivinnuni og fiskivinnuni í Føroyum
- Málbólkurin skal vera næmingar í 4.-6. flokki
- Í vavi skal undirvísingartilfarið í minsta lagi fevna um 10 undirvísingartímar
- Undirvísingartilfarið skal sammennast við Nám
- Undirvísingartilfarið skal stuðla undir hugleiðandi, djúphugsandi og hugfangandi læring, sum tekur støði í viðkomandi námsætlanum og teimum 17 heimsmálunum fyri burðardyggari menning
- Uppskot skal setast fram um, hvussu undirvísingartilfarið kundi sæð út grafiskt
- Ætlan skal gerast um, hvussu ein undirvísingarútferð til ein matvøruframleiðara kann skipast

- Eitt yvirlit yvir lyklamát viðvíkjandi móttøku og ávirkan av undirvísingartilfarinum skal setast upp
- Ein lýsing av samstarvinum við Nám um námsfrøðiliga/kenslufrøðiliga innihaldið í verkætlanini skal skrivast
- Ein ætlan fyri, hvussu tilfarið verður handað Námi, skal fylgja við
- Tíðarætlan við nágreining skal setast upp
- At enda skal yvirlit yvir samlaðan kostnað og útgreinað fíggjarætlan fylgja við

Verkætlanin má á ongan hátt vera merkt av, at ein einstøk fyritøka vil føra seg fram ella hava fyrimun av tilfarinum.

*Meting av verkætlanartilboðum*

Í yvirskipaðu metingini av verkætlanartilboðunum verður dentur lagdur á, at námsfrøðiliga endamálið týðiliga sæst aftur sum ein natúrligur partur av allari verkætlanini. Hetta merkir m.a., at krøvini, ið omanfyri eru nevnd í partinum "Innihald", skulu vera lokin.

*Spurnafreist*

Skrivligir spurningar kunnu sendast til Eyðun Gaard, stjóra í Námi, á eydun@nam.fo, í seinasta lagi 31. august 2020. Spurningar verða svaraðir so hvørt.

Skjal við svarum saman við innsendum spurningum (dulnevndum) verður lagt út á Keypsportalin.

*Innlatingarfreist*

Verkætlanartilboð skulu sendast inn við telduposti til eydun@nam.fo í seinasta lagi 15. september 2020.

Nám tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum tilboði.

*Tíðarætlan*

| | |
|---|---|
| 1. Útboð sent/lýst | 19. august 2020 |
| 2. Spurnafreist | 31. august 2020 |
| 3. Innlatingarfreist | 15. september 2020 |
| 4. Verkætlanartilboð verður valt | 30. september 2020 |
| 5. Innleiðslufundur við Nám og neyvari tíðarætlan verður avtalað | 15. oktober 2020 |
| 6. Møguligir støðufundir | Eftir avtalu |
| 7. Fyrsta uppskot til verkætlanina | 1. desember 2020 |

| | |
|---|---|
| 8. Verkætlanin skal vera liðug og latin inn | 20. desember 2020 |